UTTAN ÚR HEIMI

## Irak hevði ikki hópoyðingarvápn

Fyrrverandi irakski forsetin, Saddam Hussein, var ikki fyrireikaður til kríggj í vár, tí hann væntaði ikki, at amerikanararnir fóru at gera álvara av hóttanini at leypa á Irak.

Tað hevur fyrrverandi irakski varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz, greitt amerikanarunum frá. Aziz gav seg yvir til amerikanararnar, og hann og húski hansara hava seinni fingið friðskjól í einum ónevndum landi, aftur fyri at Aziz sigur frá tí, sum hann veit um gamla stýrið í Bagdad.

Sambært blaðnum The Washington Post hevur Tariq Aziz eisini sagt amerikanarunum, at Irak hevði eingi hópoyðingarvápn, tá landið varð álopið. Men tað vistu teir iraksku generalarnir ikki, sigur Aziz, tí Saddam Hussein duldi tað fyri teimum fyri at styrkja stríðshugin hjá herinum. Sambært The Washington Post hava irakskir vísindamenn váttað tað, sum Aziz hevur sagt. Fyrrverandi forsætisráðharrin hevur eisini sagt, at Saddam Hussein royndi at fáa Norðurkorea at selja Irak rakettir, men at norðurkoreanar søgdu nei.

## Deyða Havið doyr

Ísraelsmenn og jordanar veita nú so nógv vatn úr Jordanánni, at stórur vandi er fyri, at tað kenda Deyða Havið verður turrlagt.

Ísraelski umhvørvismálaráðharrin, Yehudit neot, sigur við tíðindastovuna AP, at støðan er álvarssom. Eitt er, at ov nógv vatn verður tikið úr Jordanánni, men áhaldandi turkur í næstan fimm ár ger eisini sítt, sigur hann. Ísraelskar kanningar vísa, at vatnsstøðan í Deyða Havinum fellur umleið ein metur um árið. Nú verður tosað um, hvat skal gerast fyri at bjarga Deyða Havinum, og tað seinasta uppskotið er at grava eina veit ella at gera ein tunnil frá Akaba Víkini við Reyða Havið og at veita sjógv haðani norður í Deyða Havið. Serfrøðingar ivast kortini í hesari loysnini, tí teir vita ikki við vissu, hvussu tað fer at ávirka vatnið í Deyða Havinum, verður sjógvur veittur hagar.

Deyða Havið er sera væl umtókt frítíðarpláss, og bæði ísraelsku og jordansku megin vatnið eru fleiri gistingarhús.

## Dýrt at finnast at kongi

Ein dómstólur í Marokko hevur gjørt av, at eitt av landsins tíðarritum skal ikki koma út næstu tveir mánaðarnar. Samstundis eru fleiri av blaðfólkunum dømd í fongsul.

Orsøkin er ein grein, sum stóð í tíðarritinum í mai. Hetta var ein samrøða, sum tíðarritið hevði havt við Mohammed al-Abbadi, sum situr í nevndini í teimum av teimum størstu islamsku felagsskapunum í Marokko. Myndugleikarnir í Marokko viðurkenna ikki felagsskapin, og í samrøðuni var ymiskt, sum kongi ikki hóvaði. Tað var nóg mikið til, at bæði ritstjórin og tveir blaðmenn máttu í rættin.

Týsdagin fingu teir báðir blaðmenninir hálvt annað ára fongsul, og blaðstjórin fekk tvey ára fongsulsrevsing. Harafturat skulu teir rinda 7.000 krónur í bót hvør, og tíðarritið skal ikki koma útaftur fyrr enn um tveir mánaðir.

## ...og forsetanum

Í Algeria skulu tíðindafólk eisini vara seg fyri, hvat tey siga og skriva, og fyrradagin vórðu tríggir blaðmenn dømdir í fongsul fyri at hava gingið landsins forseta ov nær.

Blaðstjórin á blaðnum Liberte, Farid Alilat, sigur við Reuters, at hann og tveir blaðmenn skulu í fongsul, tí blaðið tann 11. august umrøddi Abdelaziz Bouteflika, forseta og nakrar embætismenn sum tjóvar. Hetta ljóðar ógvusligt, men tað er ikki einans Liberte, sum hevur lagt forsetan og embætismenn hansara undir valdsmisnýtslu og korrupsjón. Fleiri onnur bløð hava sagt tað sama.

Men hetta gongur ikki, sigur rætturin í Alger. Teir tríggir blaðmenninir á Liberte skulu í fongsul, og blaðið skal gjalda 180.000 krónur í bót. Sambært algerskari lóg kunnu fólk fáa upp í trý ára fongsul fyri at skriva ærumeiðandi greinar um stjórnina og herin.

# Sterkasta sólarspreingingin í søguni



*Tað hevur verið sjáldsama ófriðarligt á Sólini seinastu dagarnar, og týskvøldið var tann sterkasta sólarspreingingin, sum vísindin veit um*

**Stutt fyri klokkan átta fyrrakvøldið var ein sterk spreinging á Sólini. Vísindafólk halda, at hetta er tann sterkasta spreingingin, sum nakrantíð hevur verið.**

SÓLIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Spreingingin slongdi eitt ovurstórt skýggj av glóðheitum gassi út í rúmdina. Kanningar benda á, at gassskýggið varð slongt út í rúmdina við einari ferð, sum var umleið 8,3 milliónir kilometrar um tíman.

Vísindafólk siga, at varð gassskýggið slongt beint ímóti Jørðini, høvdu fleiri fylgisveinar, sum eru í ringrás um Jørðina, fingið skaða, og streymveitingar á sjálvari Jørðini høvdu eisini verið ávirkaðar.

Tann sterkasta spreingingin, sum vísindin higartil hevur mátað á Sólini, var í 2001, men sagt verður, at spreingingin týskvøldið var nógv sterkari. Júst hvussu sterk hon var, ber ikki til at siga enn, tí verandi mátingartól røkka ikki so langt upp, sigur norski granskarin Knut Jørgen Røed við NTB.

Fyri bert einari viku síðani var fleiri sterkar spreingingar á Sólini. Tær oyðiløgdu fylgisveinar og órógvaðu radiosamskifti og streymveitingar á Jørðini.

# ST skal umskipast

**ST-aðalskrivarin hevur sett 16 fólk at kanna heimsumfatandi hóttanir og at umskipa sjálvan heimsfelagsskapin. Millum tey útvaldu er fyrrverandi norski forsætisráðharrin Gro Harlem Brundtland.**

ST-UMSKIPAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ST skal umskipast. Tað er neyðugt, so heimsfelagsskapurin skal vera førur fyri at taka sær av teimum nýggju hóttanunum, sigur Kofi Annan, aðalskrivari. Hesum boðaði hann frá longu fyri einum mánað síðani, og nú hevur hann so sett ein væl mannaðan bólk at gera uppskot um neyðugar broytingar.

Millum tey útvaldu eru fyrrverandi russiski forsetin Jevgenij Primakov, fyrrverandi kinesiski uttanríkisráðharrin Qian Qichen, fyrrverandi amerikanski trygdarráðgevin Brent Scowcroft, fyrrverandi avstralski uttanríkisráðharrin Gareth Evans og fyrrverandi norski forsætisráðharrin Gro Harlem Brundtland. Onnur umboð eru úr Afrika, Latínamerika, og formaðurin í Arabisku Samgonguni, egyptin Amr Moussa, umboðar tann arabiska heimin.

Gro Harlem Brundtland fór fyri stuttum frá sum leiðari í heimsheilsustovninum WHO eftir at hava røkt starvið í fimm ár. Nú er hon aftur vald til eitt leiðandi starv hjá ST. Við norska sjónvarpið sigur hon seg vænta, at bólkurin millum annað fer at umrøða spurningin um at víðka ST-trygdarráðið, sum í dag hevur 15 limir. Men bólkurin skal eisini umrøða nógv onnur mál, serliga á trygdarøkinum.



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**BMW 316**
árg. 1997, 90.000 km, hjól 8 x 17 215/45, er nýlakeraður.
*Tlf. 372994/266690*

**AUDI 100 2.0 E**
nýsýnaður góður Audi til sølu, árg. 88, km ca. 150.000, sóltak, 4 summardekk á felgum fylgja við, Sony anlegg við 10 CD boks, alt einans 25.000 kr.
*Tlf. 222941*

**TIL SØLU**
Motorur og gearkassi til Renault Megané 1.4 árg. 98, bíliga til sølu.
*Tlf. 213388/583388*

**PÍKADEKK Á FELGUM**
Nýggj Firestone píkadekk á felgum, stødd 175/70-13. Passa til Renault Megané, bíliga til sølu.
*Tlf. 213388/583388*

**TIL SØLU**
1 stk. baklúka, 1 stk. vinstra bakhurð, 1 stk. vinstra forhurð, vinstra + høgra baklyktir til Renault Megané, 5 hurðaður.
*Tlf. 213388/583388*

**FORD SIERRA 1.6 PLAZA**
árg. 89, sóltak, nýliga sýnaður, sportfelgur og píkadekk fylgja við. Bíliga til sølu.
*Tlf. 224960*

**NISSAN PATROL**
árg. 91, 4.2 diesel, 135 hk, marinegrønur/metallic. km 190.000. Bíliga til sølu. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 225797 ella 320323*

**TOYOTA COROLLA**
Ein Toyota Corolla, Galla modell, 1,3 l. árg. 95 til sølu. Bilurin hevur koyrt 120.000 km. Hevur fingið TIDY CAR viðgerð fyri einum mánað síðan. Tónaðar rútar. Fýra spildurnýggj heilársdekk fylgja við. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 229511 ella 322800*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 píkadekk, 185/70 R14 til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 282688*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 stk. píkadekk á felgum til sølu. Koyrt ein vetur. Passa til Kia Pride. Kr. 3.000.
*Tlf. 508531*

**ALUMINIUMSFELGUR**
4 stk. 14" aluminiumsfelgur við brúktum píkadekkum stødd 175/65 R14 og 4 holum til sølu fyri 2.000,- brúkt til Toyota Corolla.
*Tlf. 225944*

**FORD FOCUS GHIA**
Árg. 99, km. 61.000, prísuppskot: 110.000 kr.
*Tlf. 373954*

**SCANIA 142 V8**
Til sølu um nøktandi boð fæst. Árg. 86 v/ skiftilastsystem, sýnaður okt. 03.
*Tlf. 210493*

**OPEL CORSA**
Árg. 1997, nýsýnaður, koyrt 50.000 km, píkadekk og summardekk, í sera góðum standi, til sølu fyri 49.000 kr. Ring
*Tlf. 311392 eftir kl. 13.00*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum 155/80 R13, brúkt 1 vetur, lítið slitin til sølu fyri 1.800,- kr.
*Ring 216801*

**TRAKTORAR**
Traktorur ynskist til keyps, helst 4wd.
*Tlf. 218522/448222*

**GEARKASSI**
til Mitsubishi Lancer-Colt 88-92 ella bil sum eykalutir.
*Ring 316480 eftir kl. 16*

**EYKAÚTGERÐ TIL PLO CLASSIC**
Ein bagasjuberari til takið. Nýprísur ca. 1800 kr. Selist fyri 500 kr. (brúktur 5 ferðir.)
*Tlf. 257810*

**HYGG HER!**
Nýsýnaður Nissan Sunny 1.6 sgx árg 88 til sølu fyri 14.999 kr. Sportfelgur við nýggjum dekkum fylgja við. Mynd av bilinum kann sýggjast á http://heima.olivant.fo/~nskh
*Tlf. 504740*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
185/75R14 (á felgum)
*Tlf. 223610*

**TIL SØLU**
2 nýggj og 2 brúkt heilársdekk á felgum til ein Citroen Xantia. Prísur 2.500 kr.
*Tlf. 422041 eftir arbeiðstíð*

**VEGNA SERLIGAR UMSTØÐUR**
selist ein Citroen Xantia 1.9 Turbo diesel, árg. 96, km. 117.000 sýnaður feb. 03, í sera góðum standi. Prísur 87.000 kr.
*Tlf. 222878*

**SLEIPIKRÓKUR TIL SØLU**
til Ford Escort árg. 90.
*Tlf. 519016*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
Lítið brúkt píkadekk 175/65 R14 til sølu.
*Tlf. 519016*

**TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum 175 x 14 til Toyota Corolla, til sølu fyri 500,-
*Tlf. 312884/223315*

**VW PASSAT**
árg. ca. 87, prísuppskot kr. 5.000,-
*Tlf. 447723*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
Fýra píkadekk á felgum – passa til Peugeot 206, koyrt ein vetur, stødd 185/65/14.
*Tlf. 211718*

**PÍKADEKK Á FELGUM**
Fýra píkadekk á felgum til sølu. Brúkt í ein vetur. Stødd 195/65/R15.
*Tlf. 319000/257155*

**DAIHATSU CHARADE**
G-100.1,3. árg.'89, nýsýnaður, í góðum standi, koyrt 150.000 km., 4 góð píkadekk fylgja við. Bíliga til sølu.
*Tlf. 447574*

**YNSKIST TIL KEYPS**
4 felgur til Ford Escort 95 modellið.
*Tlf. 211573*

**TIL SØLU**
Ein Seat Leon TDi, 110 HK, km. 48.000. Annar bilur kann møguliga takast í býti.
*Tlf. 216300*

**FORD MONDEO 1.8 I**
Árg. 95, 118.000 km. Píkadekk fylgja við. Reinur og penur innan. Í sera góðum standi, til sølu fyri 50.000 kr.
*Tlf. 504818 ella 458042*

**MAZDA 626 2.0 TD**
Árg. 96, elrútar, sýnaður sept. 03. Ringi eftir kl. 19.00.
*Tlf. 220917*

**CITROEN XSARA 1.6 VTR**
árg. mars 02, km 35.000 Hevur aircon., cd/radio, hita í setrum, elrútar, el-spegl o.a.
*Tlf. 254100*

**HONDA ACCORD 1.8i**
Km 85.000, nýsýnaður, cd-spælara o.a. Sera vælhildin, ein eigara. Prísuppskot kr. 110.000,-
*Áhugað ringi 543041*

**NÝGGJ VETRARDEKK**
á felgum – 4 heilársdekk við píkum á sportfelgum 4.000,- kr., 4 heilársdekk á felgum 3.500 kr. Stødd 175/65/14 passa til Honda Civic.
*Tlf. 222888*

**TIL SØLU**
Mazda 323 árg. 88.
*Tlf. 256961 eftir kl. 19*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum, stødd 175/65 R14 t.d. til Toyota. Lítið brúkt til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 441764/254202*

**VIÐFESTISKRÓKUR**
til Mazda til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 213325/423325*

**PÍKADEKK Á FELGUM**
Fýra brúkt píkadekk á felgum 155/80/13 til sølu.
*Tlf. 423325/213325*

**PÍKADEKK**
Fýra brúkt píkadekk á felgum stødd 185/65/14 til sølu fyri 1500 kr. Passa til Nissan Almera.
*Tlf. 423368*

**TIL SØLU**
Citröen ZX 1.9 diesel, stationcar, árg. 95, nýsýnaður, í góðum standi.
*Tlf. 218980 ella 215656*

**PÍKADEKK**
4 góð píkadekk brúkt í ein vetur 165/80 R13 og 4 píkadekk 155/80 R13 á felgum, eisini í fínum standi.
*Tlf. 221849 eftir kl.18*

**PÍKADEKK Á FELGUM TIL SØLU**
Vredestein 185/70/14. 4 hol.
*Tel. 250542*

**MITSUBISHI PAJERO**
1988, 2.5 TD. Longra modellið v/ setrum aftan.
*Tlf. 313824 best e. kl 17*

**CITROEN ZX 2.0**
árg. 95, km 92.000 hevur vel, el rútar aftan og framman, el spegl, el sóltak osv.
*Tlf. 270259*

**TOYOTA CARINA II 1.6**
model AT 151 árg. 88 til sølu fyri 17.000 kr.
*Tlf. 254464*

**VØRUBILUR TIL SØLU**
Toyota Hiace diesel, árg. 88, nýsýnaður, til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 250133*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
Fýra lítið brúkt píkadekk á felgum til sølu fyri 1200,-
*Tlf. 554554*

**TIL SØLU**
Mazda 626, árg. 86, koyrir væl, bert koyrt 100.000 km, manglar ábøtur, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 422139 ella 222342*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12[00], t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:
Navn:…………………………………………..
Bústaður:……………………………………
Bygd/býur:…………………………………..
Tlf.: ………...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Amboð

**TIL SØLU**
Arbeiðsprojektørur 1000 w. Prísur 500 kr.
*Tlf. 443402*

## Arbeiði

**ARBEIÐI YNSKIST**
Eg eri ein 25 ára gomul kvinna sum søkir arbeiði í Tórshavn. Eg havi HH og dugi sera væl mál og at arbeiða við teldu. Nærri fæst at vita á
*tlf. 221381*

**ÚTRÓÐUR**
Er tað nakar, sum manglar ein mann við sum avloysara, helst úr Klaksvík.
*Tlf. 269909*

**MÁLARAARBEIÐI**
innandura verður gjørt skjótt og bíliga. Ring og fá eitt tilboð.
*Tlf. 250387*

**GRAVING Í TÓRSHAVN**
Alt graviarbeiði verður gjørt við maskinu. Vit snøgga rundan um húsini, grava út fyri bilhúsi, hjalli, garði o.t. Hugsa um at vera í góðari tíð, um tú t.d. ætlar at snøgga uttanfyri, soleiðis at tað grova arbeiði er liðugt, tá várið kemur.
*S/pf ENL, tlf. 223717*

## Barnaansing

**EG ÁTAKI MÆR**
at ansa einum barni uml. 20 tímar um vikuna. Helst fyrrapart.
*Tlf. 315609 ella 262581*

## Barnaútgerð

**BABYDAN-PORTUR**
Portur av merkinum BabyDan til sølu. Portrið er ætlað at seta fyri trappur og hurðar, ið hava breiddina 64 til 106 cm. Tað kann regulerast hareftir. Portrið er sum nýtt. Nýprísur uml. 800 krónur. Til sølu fyri 400 krónur.
*Ringið 328083 - 282083 - 229434*

**BARNABILSTÓLUR**
Britax bilstólur upp til 13 kg. til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 317564*

**SCANDIA**
koyristólur u/galesju, 1 klappvognur, 1 lambaskinn, paraply, innkeypsnet + kurv, selist alt samlað fyri 1.200,- kr.
*Tlf. 322850*

**HOKUS POKUS STÓLUR**
til sølu fyri 300 kr. Klappstólur 100 kr. Vælhildið.
*Tlf. 317770 eftir kl. 18.00*

**TIL SØLU**
Britax bilstólur 0-18 kg, lítið brúktur og vælhildin, til sølu.
*Tlf. 221425*

**TIL SØLU**
Gráur Simo Shoppari við lufthjólum, luftpumpu og regnslagi til sølu. Babylift, myrkablá, lítið brúkt, til sølu.
*Tlf. 221425*

**BILSTÓLUR**
0-36 kg. av slagnum Britax Club Claso Extra til sølu fyri 650 kr.
*Tlf. 317377*

**BILSTÓLUR**
0-13 kg. av slagnum Chicco við galesju til sølu fyri 450 kr.
*Tlf. 317377*

## Bátaútgerð

**TIL SØLU**
Goggur til sølu.
*Tlf. 517413*

**PÁHANGSMOTORUR**
Páhangsmotorur til sølu Mercury 9,9 HK til sølu fyri kr. 8.000,-
*Tlf. 228189 ell 332647*

**BÁTAMOTORUR**
Ein Volvo Penta MD2 B bíliga til sølu.
*Tlf. 421656/224801*

**10-MANNAFAR**
Vælútgjørt Kaldbaks 10-mannafar til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 218896*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Bíligur glasfiburbátur uml. 18 fót, ynskist til keyps við ella uttan motor.
*Tlf. 441234*

**BÁTAPLÁSS**
Søkt verður eftir bátaplássi í Vestmanna.
*Tlf. 421343*

**SPEEDBÁTUR TIL SØLU**
14 fót, 90 hestar, Evinrud 28.000 kr.
*Tlf. 448114/229139*

**5-MANNAFAR VIÐ FISKILOYVI**
til sølu, við 15 hestar Yanmar motori. Nærri fæst at vita við at ringja á
*tlf. 421308 eftir kl. 17*

**FURUNU GPS**
v/ antennu til sølu, nývirði ca. 3.300 selist fyri 2.500 lítið brúktur.
*Tlf. 222211*

**TIL SØLU**
Spæl og vognur til seksæring til sølu.
*Tlf. 281226*

**ER TAÐ NAKAR**
ið eigur klárar gogguglúpar at lata mær.
*Tlf. 422358*

## Bingo

**BINGO VERÐUR**
leygardagin kl. 20. Á lutaseðli at vinna m.a. kjøt, gávukort, ræst krov, eisini er eykaspæl og bingola.
*Tórshøll*

**GOTT JÓLABINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 25. november kl. 19. 6. og 12. spæl gávukort á 500 kr. Nógvir góðir vinningar so sum dunnur, karamellur og nógv annað gott. 12 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli balja full av mati. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

**ÁRASØLAN**
verður í Framtíðini leygarkvøldið kl. 19.00. Yvir 100 góðir vinningar m.a. vikuskifti fyri tvey, virði 2.500 kr., 1.000 kr í olju og stereoanlegg.
*Frelsunarherurin í Vági*

**FRÁ EYDNUNI**
Jólabingo verður sunnudagin 30. nov.
*Eydnan*

**VINN TARV**
Við at skriva TARV á eini sms-boð og senda tey til 1441, ert tú við í kappingini um tann stóra tarvin. Sms-boð kosta kr. 25 + vanl. sms-takst. Til ber at senda fleiri sms-boð. Sí á portalinum.
*Báran*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórsdagin 5. nov. kl. 19.00. Bæði eykaspølini enda.
*Nevndin*